## NØVN Í VIKUNI

# Erik Petersen 90 ár

Fríggjadagin 18. maj verður Erik Petersen, cand.mag., fyrrv. lektari í Havn, 90 ár.

Erik Petersen var føddur 18. mai 1911 í Fuglafirði. Foreldur hans vóru Samuel Petersen, keypmadur í Fuglafirði, ættaður úr Kollafirði og Julia Petersen, fødd Hansen, av Eiði.

Erik Petersen hevur verið slógbrótari innan bæði føroyskt skúlaverk og musikklív.

Hann kom til Havnar sum blaðungur tannáringur fyri at ganga í skúla. Fekk millumskúlaprógv 1926 og realprógv 1927 frá Færøernes mellem- og realskole. Musikkansur hans man vera sprottin og nørdur úr tí musikalska umhvørvi, sum var í Havnini eftir aldarskiftið, við bakar Georg Hansen sum tí miðsavnandi persóninum. Klassiskur tónleikur hevur ikki havt náttúrliga vist í føroyska gerandisdegnum fyrr enn nakað inn í síðstu øld. Vit vita at J.C.Svabo (1746-1824) spældi eitt sindur uppá violin, og hevur sum nótakønur skrivað niður nøkur samtíðar løg, m.a. kvæðalagið til "Orlov biðjum vær".

Leikpallurin fyri skaldsøgu William Heinesens "De fortabte spillemænd" er ikki at rokna sum nakað serføroyskt fyribrigdi. Men í henni verður lýstur eitt umhvørvi, har kamarmusikkur er ein náttúrligur karmur í gerandisdegnum, sum ein eisini kann hugsa sær, at hann hevur verið fyri bakar Hansen og hansara líkar.

Í bókaverkinum "Horvnar Havnarmyndir" lýsir M.S.Viðstein, hvussu menn savnaðust fyri at spæla saman: "At siga nær, ið teir byrjaðu við hesi strúkikvartett, letur seg ikki gera, tí helst hava teir hildið tað í loynd fyrstu tíðina. Men kvartettin - strúkikvartettin - var veruleiki í 1882, tí tá varð mynd tikin av teimum, meðan teir spældu. "Álvarsamir sótu teir og spældu, tí taktin skuldi haldast, men komu teir til nakað sprellivandi í einhvørji allegro, so smíltust teir fyri seg sjálvar. Teir vóru glaðir við tónleikin, og teir vóru góðir við hann. ..."

Erik Petersen fekk studentsprógv frá Høngs Gymnasium. Bleiv útbúgvin cand.mag. í 1936 frá lærda háskúlanum í Keypmannahavn við høvuðsgrein donskum (speciali føroyskt) og musikki. Pedagogikum tók hann í 1937. Fekk violinundirvísing frá Erling Bloch, konsertmeistara við Kongiliga Kapellið, seinni professari vid Kongiliga danska Konservatoriið í Keypmannahavn. Longu í lestrarárum var Erik Petersen virkin innan musikkvísindaligt arbeiði, fyrst og fremst við niðurskriving av føroyskum kvæðaløgum. Ta seinastu tíðina, meðan hann las, kom hann upp í arbeiðið við at seta ein studentaskúla á stovn í Føroyum. Og varð hann her ein millumgongu-maður fyri at fremja sjónarmið Løgtingsins um, at føroyskt mátti fáa fullar sømdir.

Heimafturkomin til Føroya eftir lokið prógv, kom hann saman við Thomas Nygaard og Christian Haraldsen at leggja lunnar undir at føroyskur studentaskúli varð settur á stovn. Hann var formaður í nevnd landsstýrisins til broyting av skipan viðvíkjandi føroyskum-donskun í gymnasiulógini. Tey fyrstu árini virkaði hann sum adjunktur, seinni lektari, í donskum og føroyskum vid Løgtingsins Studentaskeið. Við síðuna av hesum undirvísti hann í sangi og violinspæli við Føroya Læraraskúla. Seinni varð so veruligi 3-ára studentaskúlin stovnaður í Hoydølum; í fyrstu tíðini í hølunum á tuberklasanatoriinum. Tann nýggji stásiligi skúlabygnin-gurin í Hoydølum varð tikin í brúk í 1965.

\- - -

Tórshavnar Musikkskúli varð settur á stovn í 1942. Í leiðsluni vóru frá byrjanini góðir menn sum H.A.Djurhuus, M.A. Jacobsen og William Heinesen. Men praktiska musikalska leiðslan var í hondum Erik Petersens. Tað var hann, sum fekk í lag, at tað so við og við kom eitt strúkior-kestur í gongd. Í fyrstuni hevur tað allarhelst verið í smærri samanhangum, sosum kvartettspæl o.l. Ein kann hugsa sær at tað hevur verið á sama hátt sum bakar Hansen í síni tíð savnaði saman menn til kamarmusikk. Í hvussu so er hava tað enn verið undir nøkulunda somu umstøðum og vilkorum. Tað trúliga og seiga toyggjið, tað er at fáa eitt virkið kamarorkestur á føtur, hevur ligið á hansara herðum. Erik Petersen var hugsjónarmaður. Hann arbeiddi miðvíst fyri at lyfta tað musikalska støðið. Hann var stjórnarlimur í Dansk-Færøsk Kulturfond síðani hetta varð stovnað.

Erik Petersen. fekk í lag samarbeiði við eliterar úlendskar tónleikarar, og virkaði fyri at fleiri slíkir komu hendan vegin at leggja okkum lag á, tónleikinum viðvíkjandi. Nevnast kunnu nøvn sum Gunnar Tagmose, Peter Weiss, Béla og Tove Detrekøj og Henrik Sachenskjold.

Tíðarskeiðið, tá ið Mogens Vahl var ríkisumboðsmaður hér, vóru sannir vælmaktsdagar fyri Tórshavnar Musikkskúla. Sjálvur var Mogens Wahl eldhugaður musikkmaður og úrmælinga klaverspælari vid teknikki væl hægri enn á vanligum amatørstøði.

Í hesi tíðini vórðu framført fleiri verk við stórari symfoniorkesturmanning. Spæld vóru fleiri wienerklassiskar symfoniir og 2 klaverkonsertir av Mozart, har Mogens Wahl sjálvur var solistur.

\- - -

Fyri sjálvur at vinna sær meiri musikktekniskt hegni bað Erik Petersen 1966-67 um farloyvi og leitaði suður til navnframa violinprofessaran Tibor Varga við Nordvestdeutsche Musikakade-mie í Detmold í Týsklandi. Her fylgdi hann undirvísing eins og hann fleiri ferðir seinni luttók á "master class" stevnum í Sion í Sveits. Hetta uppihald hjá Tibor Varga hevur óivað givið honum holla kjølfestu í víðari undirvísingarvirkinum eftir heimkomuna..

Í sjeytiárunum vitjaði klavertrioin Trio Pro Arte javnan í Føroyum. Avtala var komin í lag um, at hetta ljómlið, umframt at vegleiða, skuldi hava umsjón við musikkundirvísingina. Hetta virkaði so eina tíð.

Men síðst í 70'unum kom avgerandi broyting í. Nýggjar kreftir vóru komnar til, og so við og við vaks ynskið um, at nýggj musikkskúlaskipan skuldi koma í lag við landsumfatandi musikkundirvísing.

"Nýggj tíð er komin", sum skaldið kvøður.

Í dag hava vit musikkskúlaskipan um alt landið undir leiðslu av landsmusikkskúlastjóra.

Og vit hava eitt fullbúgvið symfoniorkestur, enn tó treytað av útlendskari hjálp, tá ið á stendur við stórum framførslum.

\- - -

Erik Petersen hevur stak gott handalag og góðan ans fyri mekanikki. Tað er tí ikki uttan grund, at hann hevur havt fleiri ymisk frítíðarítriv. Hann er soleiðis ein framúr hegnigur instrument-byggjari. Slíkan kunnleika, sum Erik Petersen hevur nomið innan hetta øki er undrunnarverdur! Slíkt kann ein bert meistra við at granska við eldhuga, nærlagni og tolni. Eg veit at hann eisini hevur fingist við at útdjúpa tey støddfrøðisligu viðurskifti innan strúkiinstrumentir. Hendan hugdýping krevur lívlangt studium. Komi her í tankar um menn sum Leonardo da Vinci, hvørs vitskaparliga forvitni førdi hann víða um í rannsóknum og royndum. Kynstrið at byggja góð og dýrmett strúkiinstrument er enn partvís ein loynidómur. Síðani blómatíð cremonameistranna var av umleið 1760, fór nógv av tí fína listhandverkinum í gloymskuna. Um hvussu lakeringstilfar varð framleitt, um turking av trætilfari v.m. Í nýggjari tíð hava fleiri royndir verið gjørdar at endurskapa hendan kynstur. Ikki minnst við nýmótans tøknifrøði. Roynt hevur verið at greina tey støddfrøðisligu viðurskifti. Millum annað í sera forvitnisliga, men torskilda bókaverkinum "Gåten fra Cremona" (1961) av norðmanninum Ivar Orestad. Fleiri violinir og nakrar bratschir hevur Erik Petersen latið úr hondum. Hansara instrumentir hava øll eina sermerkta útsjónd í ljósari brúnari lakering. Serliga eitt instrument, ein ávís bratsch, er eitt satt meistaraverk. Hon smæðist ikki burtur í dygd sammett eisini við ljóðfør frá meginlandinum. Mær hevur unnast fleiri ferðir at spæla uppá hesa bratsch, m.a. tá eg allment havi framført "Kingo-variatiónirnar".

\- - -

Innan musikkvísind hevur Erik Petersen millum annað verið ráðgevi og samhøvundur til ritgerð H. Grüner-Nielsens "De Færøske Kvadmelodiers Tonalitet i Middelalderen" frá 1945, givið út í tíðarritinum Færoensia (Societatis Litterarum Færøensium Hafniensis). Lutur hans í hesum verki var tað stóra, kravmikla og tolsama arbeiðið at eftirlurta gamlar fonograf-iskar innspælingar og festa sungin og kvøðin løg á nótablað. Løgini eru ikki bert niðurskrivaði við størsta nærkvæmi, men dentur er lagdur á, at tann tilhoyrandi tekstur fonetiskt svarar til tað, sum veruliga varð sungið. Mett er at hesar niðurtekningar eru væl nágreiniligari enn tær higartil gjørdu av føroyskum kvæðaløgum, m.a. av fólkamusikkgranskaranum Hjalmar Thuren í 1908 (Folkesangen paa Færøerne).

Tað var Erik Petersen, sum umleið .í 1947 niðurskrivaði "Kingo-variatiónirnar" av William Heinesen. Verkið er 10 variatiónir yvir gamla føroyska lagið til sálmin "Vaagn op og slaa paa dine Strenge". Í hátti er hetta ein stíleftirgerð - pasticha - í barokksniði. Upprunaliga varð verkið noterað fyri violin í G-lyklinum. Seinni vórðu variatiónirnar transponeraðar fyri bratsch solo. Erik Petersen hevur sagt mær frá, at grundin til hetta var, at hann, júst um hetta mundið, var liðugur við eina nýggja bratsch. Tá ið William Heinesen hoyrdi instrumentið, fall honum í hug, at tess djúpa og meiri monumentala tónaregistur fullu meiri í økt við gamla sálmalagið.

\- - -

Erik Petersen var lærari mín í donskum í Hoydølum. Onkuntíð var hann próvdómari í føroyskum og fornnorrønum. Meginregla Erik Petersens innan føroyska málrøkt er tann, at nýtta málið skal vera nýtslumerkt (pragmatiskt) . Her er hann á linju við Rikard Long. Um eitt orð, ein vending, er betri søgd við einum útlendskum úttrykki, ja, so er at nýta tað, og ikki kroysta fornar (íslendskar) gerandisfremmandar máliskur inn í talumálið.

Erik Petersen er tann einasti, sum er eftir av teimum, ið vóru við at seta studentaskúlan á stovn. Í samfull 40 ár starvaðist hann sum lærari á skúlanum.

\- - -

Góði Erik Petersen ! Tygum hava góða partin av æruni fyri at musikkvirksemið í Føroyum er á tí støði, sum tað er í dag, og at haldgóðir lunnar vórðu lagdir fyri tí blómandi musikklívi, sum nú grør á Føroya Landi!

\- - -

Hjartaliga tilukku við níti ára føðingardegnum !





